UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 11. des. 2023
J.nr.: 23/24136

Svar upp á § 52a fyrispurning nr. 52-053/2023 frá Helga Abrahamsen, løgtingsmanni, um kunngerð um burturkast

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. Hvussu langt er arbeiðið komið við at gera eina nýggja kunngerð um burturkast?
2. Nær verður nýggja kunngerðin lýst?
3. Hví hevur arbeiðið tikið so langa tíð?

Metingar vísa, at um vit halda fram við at nýta náttúrutilfeingi eins og vit gera í dag, so fara vit at hava tørv á trimum klótum í 2050 (Tøl smb. UNDP). Náttúrutilfeingið er ikki endaleyst, og økt framleiðsla av nýggjum lutum úr nýggjum tilfari, ið eftir stutta tíð verður brent ella tyrvt, er ikki haldfør.

Fyri at avmarka okkara nýtslu av náttúrutilfeingi og minka um dálking og útlát, skulu vit brúka tilfeingið so nógvar ferðir, ið til ber, heldur enn at tyrva ella brenna tað. Vit skulu flyta okkum úr einum linjubúskapi, har vit troyta og blaka burtur, til ringbúskap, har vit avmarka okkara tørv á náttúrutilfeingi og endurnýta og endurvinna tað, ið vit framleiða.

Tí skulu vit hava nýggjar reglur fyri burturkastøkið. Tað nýggja við kunngerðaruppskotinum, ið talan er um í mun til galdandi kunngerð er, at hon setur karmarnar fyri einum undirstøðukervi til ringbúskap við meira endurnýtslu og endurvinning av burturkasti frá húsarhaldum og vinnu. Kunngerðin ásetur, at kommunur skulu handfara burturkast sambært burturkaststiganum:

1) endurnýta (brúka lutin umaftur)
2) endurvinna (brúka lutin til okkurt annað við at broyta hann)
3) Brenna (fáa hita burtur úr)
4) Tyrva

Lutir kunnu einans fara niður í burturkaststiganum, um tað ikki er møguligt ella ráðiligt, sæð í mun til ringbúskap og útlát, at hava teir longri uppi í stiganum.

Til nr. 1
Kunngerðaruppskotið um burturkast skal gjøgnumgangast og tillagast saman við IRF og KB, tá ið landsætlanin fyri burturkast er gjørd liðug. Miðað verður eftir at fáa hetta arbeiðið gjørt liðugt í januar 2024.

Til nr. 2
Væntandi verður kunngerðin lýst í februar 2024.

Til nr. 3
Ein høvuðstáttur í nýggja kunngerðaruppskotinum er, at land og kommunur saman skulu gera eina landsætlan fyri burturkasti, og henni á baki eina kommunala ætlan fyri burturkasti. Ætlanirnar skulu galda í 10 ár, men broytingar kunnu gerast í gildistíðini, um tørvur er á tí.

Tá uppskot til kunngerð um burturkast var í hoyring í fjør summar, vístu ummælini, at tørvur var á rættiliga týðandi broytingum í uppskotinum. Samstundis varð mett, at landsætlanin fyri burturkast, ið uppskotið til kunngerð ásetur skal gerast, mátti orðast, áðrenn kunngerðin kundi lýsast. Hetta tí, at tað er við landsætlanini saman við teimum kommunalu ætlanunum fyri burturkast, at nýggja kunngerðin fer at bróta frá galdandi kunngerð.

Landsætlanin skal áseta, hvørji mál kommunurnar skulu røkka á burturkastøkinum næstu tíggju árini, við serligum atliti at teimum fyrstu fimm árunum. Ásett er í umhvørvisverndarlógini, at hetta arbeiðið skal gerast saman við kommununum, og tær skulu síðani gera eina kommunala ætlan fyri burturkast, sum skal stuðla upp undir stevnumiðini í landsætlanini.

Arbeiðið við landsætlanini hevur tó verið drúgvari enn væntað, men sum áður nevnt, verður uppskot til kunngerð væntandi liðugt í februar 2024.

Umhvørvismálaráðið, 11. desember 2023

Ingilín D. Strøm
landsstýriskvinna